# Kjak

Bjarki Skúvadal

## Skarvahópmorð inni á Vestmanna

Fríggjamorgunin nakað fyri middag hoyrdist ein øgilig skotríð úti á havnini, hugdi út og sá, at sjógvurin út fyri Dánjaljákupsastíggj allur stóð í einum roki. Fyrsti tankin var, har er omanlop, men har lá ein bátur beint útfyri, og so var gitin gáta, hann skeyt aðru skotríðina. Tríggir mans, helst við hvør sínari 5-skots byrsu, í øllum føri vóru skotini so títt og nógv, at í hvussu er eini 15 skot vóru í hvørjari ríð. Hvat er hetta fyri nakað? hugsaði eg, og skjótt kom tað mær í hug, at í dag er fyrsti oktobur, loyvt at skjóta skarv! tað var tað- teir skutu skarv!

Eg má siga, at eg var skelkaður, álvaratos kann skarvur ella ein hvør annar fuglur, sum leitar sær higar inn á havnina, ikki fáa frið????

Mátti so fara at kanna, um tað var loyvt at skjóta fugl inni á havnini, men fekk einki nøktandi svar, so her er okkurt ógreitt.

Veit ikki hvørja heimild bygdarráðið hevur, men fari staðiliga at heita á tær æraðu frúur og harrar, sum har sita, at bera so í bandi, at slíkt barbarí ikki endurtekur seg.

Hesin báturin lá so og sigldi millum Dánjaljákupsastíggj og Egilsnes, ein teinur upp a einar 4-500 metrar, í einar tríggjar fýra tímar, og skotini dundu títt og ofta tveir teir fyrstu tímarnar, men so hæsaði spakuliga av, sum rímuligt er, tí nú høvdu teir púrgjørt hvørt einasta nev, sum har sat. Eru teir glaðir? erpnir? Munu teir halda seg hava gjørt eitt bragd? Hava teir bjargað nøkrum frá at doyggja í hungri?

Eg haldi slíkt er barbarí út um øll mørk! Allur sjófuglur, sum leitar sær inn á eina og hvørja havn, vík, vág ella fjørð, har fólk býr við, skal fáa frið, tað skuldi ikki verið neyðugt at heitt á fólk um slíkt, tað mátti verið hvørjum sámuliga siviliseraðum persóni greitt og sjálvsagt.

Hetta skal ikki skiljast, sum at eg eri ímóti at landsins tilfeingi verður troytt, sjálvandi skulu vit nýta tað tilfeingið, sum hetta landið kann veita okkum, hvat skulu vit annars vera her til? At eta pitsu og lasagnu og blaka vembur og annað gott av seyði burtur, er í mínum huga nær um sama barbaríið, sum fyrrnevnda skarvamorð, men vit mugu læra okkum, at fuglur og annað livandi ikki bara skal drepast, okkurt stað má vera har hesi ólukkudýrini fáa frið, t.d. tey fyrr nevndu støðini. Eisini áttu vit at havt eina siviliseraða støðu til skotváp og veiðu, so ikki hvør d..... h..... bara hann er fyltur 18 ár, kann fara út at veiða við byrsu og myrða frá hond, so einki er eftir til komandi ættrarlið.

Er nóg mikið av skarvi ella øðrum fugli til, so haldi eg tað vera í lagi at veiða sær eitt kók ella tvey, men álvara tos, tríggir mans við hvør sínari "pump-gun" myrða frá hond inni á havnini her?????, hugsið tykkum til, um nú hvør maður, sum átti bát og byrsu, gjørdi tað sama, so lógu einir hundrað bátar og kanska 300 byrsur og plaffaðu í allar ættir, og tað var ikki ein einast fuglur eftir á lívi.

Eru vit nú so nógv ríkari og glaðari, nú hvørt skarvsbein, sum her inni sást fyri middag fríggjadagin antin er myrt ella jagstrað burtur hiðani?????

---



Jóhan Heri Joensen

## Fuglafjarðar býráð arbeiðir í heimildarloysi

Eg havi áður verið sera atfinningarsamur móti Fuglafjarðar býráð - serstakliga havi eg funnist at eldrapolitikkinum og skúlapolitikkinum. Eg má tiverri halda áfram, tí vitloysið í Fuglafjarðar kommunu er so vilt, at orð næstan ikki eru fyri tí.

Tað kann væl verða, at eg eri eitt frábrygdi sum fuglfirðingur, tí fuglfirðingar annars eru vanliga fittir, nikka og góðtaka alt, men eg dugi ikki at láta sum einki.

Atfinningarnar verða ikki gjørdar fyri at verða negativur, men eru ein erlig knokkroyting av almennum persónum, fyri at teir kunnu taka tað arbeiðið teimum er latið upp í hendur við størri ábyrgdarkenslu, og verða greiðir yvir, at óregluligar avgerðir verða revsaðar.

Eg sat sjálvur í býráðnum í 8 ár, og setti mær sum høvuðsmál at fáa lagt til rættis eina langtíðarætlan fyri Eldraøkið og Skúlan. Ta søguna havi eg fyrr umrøtt, so eg skal lata vera at endurtaka meg sjálvan.

Eg hevði ikki meira enn latið hurðina aftur eftir mær, fyrr enn langtíðarætlanin fyri skúlan varð skrottað til fyrimuns fyri eini "Fatamorganaætlan"sum liggur einastaðni langt frammi í framtíðini, helst er rætta heitið "UDE I DET BLÅ".

Ikki tí, ein vælmannað nevnd er sett til at arbeiða í einum tómrúmi sum ikki er okkum ókunnugt. 30 ára dreymurin er framvegis bert ein dreymur, og barnaskúlin heldur tískil fram í skammiligum hølisviðurskiftum.

Tað eina skattaprosentið, sum avsetast skuldi til Ellisheim varð broytt til at brúkast til dagligan rakstur. Flestu av sitandi politikarunum eru tískil sannir orðloysingar

Soleiðis er politikkur tíverri oftani. Brotin lyftir og tóm orð.

**MEN!!!!!**

Tá eg hoyrdi, at peningurin (7 milliónir krónur), sum settar vóru av til Ellisheim varð tikin av kontoini, tá bar ikki til at verða fittur longur, eg fannst tí at avgerðini.

Um peningur skal takast av konto, sum settur er av til ávíst endamál, so skal tað góðtakast á tveimum býráðsfundum. Í hesum føri hevði tað yvirhøvur ikki verið fyri á nøkrum býráðsfundi, og tískil varð kontoin tømd í heimildarloysi.

Á góðum føroyskum "**PENINGURIN VARÐ STOLIN**" av kontoini.

Orðini eru hørð – og kunnu eisini gera, at eg verið stevndur fyri tey. Tað eri eg ikki bangin fyri – Eg skal eisini møta, og tala mína søk, um so verður.

Men krimiin er ikki av enn.

Sum árið gekk, fór ringa samvitskan at níva politikarar og fyrisiting. Í desember mánaði verður tí innkallað til fund.

Punkt á skránni er: At gjalda innaftur STOLNA peningin, men andstøðan saman við Kristinu Toftegaard segði nei til at rætta feilin.

Varð tað ikki Kvinnuflokkurin, sum vildi arbeiða fyri teimum bleytu virðunum???

At stjala peningin sum avsettur varð til Ellisheim og brúka hann til gjald av kostnaðarmiklum luftkastellum. Er tað at verja tey bleytu virðini???

Mín persónliga meining er:

At øll andstøðan saman við Kristina Toftegaard fáa møguleikan at ganga barnaskúlan umaftur. Tey eru so avgjørt ikki búgvin til at taka avgerð fyri onnur.

Roknskapurin verður undrunarvert á býráðsfundi góðtikin, uttan so frægt sum eina atfinning frá nøkrum býráðslimi. Andstøðan sat so smoykin, sum bukaðir hundar, og tordu ikki at lata munnin upp. Ein einkisigandi grannskoðaraviðmerking, setti heldur eingi krøv.

### Heimildarloysi er framvegis heimildarleyst

Ein HOUSA fundur í desembur kann á ongan hátt rætvísgera lógarbrotið.

(Tveir býráðsfundir skulu til fyri, at geva loyvi til at tøma kontoina.) Um rætt skal verða atborið er bert eitt at gera, og tað er at gjalda peningin innaftur uttan nakra fundarviðtøku yvirhøvur.

Tað undrar meg eisini, at roknskapurin kann verða góðtikin á so skeivum grundarlagi. Uttan nakrar treytir til at gjalda innaftur.

Veruleikin er, at býráðið, sum sitið hevur seinastu 8 árini, hevur koyrt Fuglafjarðar kommunu fullkomuliga á reyvina.

Fyri 8 árum síðani stóð fíggjarliga væl til. Síðani tá hevur kommunan, sum ongantíð áður, selt fleiri av ognum sínum. Talan er um nógvar milliónir, og peningurin er brúktur til dagligan rakstur.

Tíbetur vóru teir steðgaðir, táið teir ætlaðu at forera frystitunnlarnar niður í egnar lummar.

Kommunala lánsheimildin hevur nátt loftinum, men ikki nokk við tí. 7 milliónir eru í heimildarloysi tiknar av Ellisheimskontoini, og sum rosinan í pylsuendanum so ljóðar, at kommunan hevur ein kassakreditt upp á aðrar 7 milliónir. – Leggið tykkum í geyma, her er talan um ein kostnaðarmiklan kassakreditt og ikki eitt vanligt lán.

JÚ víst – her er talan um galloperandi vitloysi.

Men gerið tykkum greitt. Tað er ikki bert tann eini persónurin sum hevur ábyrgdina.

Øll 9 eru samsek.

**NB:**

Fíggjarætlanin fyri 2011 skal nú viðgerast. Spennandi verður at síggja um andstøðan saman við Kristinu og einum øðrum ábyrgdarfullum býráðslimi hava rygg til at rinda peningin innaftur á kontoina – og lata hann fáa frið til at verða standandi til avsetta endamálið (ella líknandi endamál).

Leggið tykkum í geyma, at stuldurin av ellisheimskontoini enn hongur um herðar tykkara. Eitt lógarbrot kann ikki blástemplast á einum HOUSA fundi í desember mánaði – enn minni í einum ársroknskapi.

(At fylla á aftur kontoina, fyri síðani við 2 lógligum býráðsfundum at tøma hana aftur - ella - at framskriva ábyrgdina á ryggin á einum komandi býráði er ein luskutur politikkur.)